# Føroyingur nýggjur fíggjarstjóri hjá A/S Dansk Shell

**Tummas Hansen, sum er ættaður av Toftum, varð tann 1. juni settur sum fíggjarstjóri hjá A/S Dansk Shell. Við hesum er ein føroyingur sostatt komin inn í leiðsluna hjá stóra felagnum**

STARV
*Ragnhild Ellingsgaard*

Tummas Hansen byrjaði yrki sítt hjá stóra felagnum í 1982, tá hann fekk arbeiði hjá Shell íFøroyum. Her starvaðist hann tey næstu fimm árini, harav hann tvey tey seinastu árini starvaðist sum búskaparstjóri.

Í 1987 fór hann til Danmarkar, har hann fekk arbeiði sum innanhýsis grannskoðari hjá A/S Dansk Shell. Tummas hevur eisini búleikast tvey ár í London, meðan hann hevði starv sum Project Manager á høvuðsskrivstovuni hjá Shell í London.

Inntil nú hevur hann starvast sum Corporate Controller hjá Dansk Shell, men hetta verður nú býtt um við starvið sum fíggjarstjóri.

Tummas skal avloysa Jakob Stausholm, sum fer undir nýggjar avbjóðingar sum Group Chief Internal Auditor hjá Shell í London.

Sum fíggjarstjóri verður Tummas Hansen ein partur av leiðsluni hjá danska felagnum, og er hetta starv eitt tað hægsta, ið ein kann fáa innan Shell í Danmark.



*Tummas Hansen er nýggjur fíggjarstjóri hjá A/S Dansk Shell*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri hjálpsemi
og sýnda samkenslu, tá ið bróður, svágur,
mammu- og pápabeiggi okkara

**Jógvan Johannesen**
Í Miðstovuni, Á Sandi

andaðist og fór til gravar.

*Fyri tey avvarðandi*
**Turið og Sigurd**

## Tøkk

Tykkum øllum, ið sýndu góðu mammu,
tvíburðasystir og mostir

**Anette Wang**
Tórshavn

seinasta heiðurin, takka vit hjartaliga.
Fyri trúfesti, henni varð sýnt á ellisárum,
vøkur eftirmæli og gávur til Amnesty International,
takka vit somuleiðis.

*Fam. vegna*
**Sverri, Birgitte og Henrik**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at kæri maður mín, pápi, verpápi, abbi, langabbi
og oldurabbi okkara

**Martin Eysturdal**
Klaksvík

andaðist sunnudagin 4. august, 97 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi
mikudagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni
hósdagin kl. 13.30.

*Familjunnar vegna*
**Sigrid**

†

**Kári Dalsgaard Petersen**

fer til gravar úr Vesturkirkjuni
leygardagin 10. aug. kl. 13.00.

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi,
tá kæri maður mín, pápi, verfaðir, abbi
og langabbi okkara

**Hinderiekus Lamain**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til Sonju Klein, prest, fyri góð og troystarrík orð.
Tøkk til sangarar úr Nólsoy.
Tøkk til skipara og manning á m/s Bliki.

Tøkk fyri blómur og kransar og tøkk til øll tykkum,
sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Marjun**

## Japan ræðist USA og IWC

**Kendi norski hvalaveiðumaðurin, Steinar Bastesen, gevur USA og IWC skuldina fyri at Japan hevur boðað frá, at tey ikki ynskja at innflyta hvalatvøst í ár**

*Jógvan Hugo Gardar, Oslo*

Stórtingslimur og hvalaveiðumaður, Steinar Bastesen, er skuffaður av Japan, ið hann meinar ikki torir at opna fyri innflutningi av hvalatvøsti, tí USA og altjóða hvalaveiðuráðið (IWC) eru ímóti.

– Hetta kemur ikki óvart, men eg hevði vónað eitt annað svar frá Japan, sigur Bastesen. Hann vísir aftur spurninginum, um tað er PCB sum kann hava fingið japanar til at siga nei.

– Tað er so lítið PCB í norska tvøstinum, at tað sæst ikki aftur á einum støvkorni.

Krøvini hjá Japan eru so hørð, at ikki er møguligt hjá norðmonnum at fylgja teimum í ár, og helst ikki komandi ár heldur. Japan krevur, at hvør einstakur hvalur verður pakkaður og sendur.

– Hetta kravið ger, at vit noyðast í land fyri hvønn einstakan hval sum vit skjóta. Tað er als ikki møguligt, sum støðan er

Hann er heldur ikki nøgdur við ávísingina av PCB í spikinum. Sambært Bastesen vísa kanningarnar, at tað er sera stórur munur millum hvalirnar, og at tað ikki kann sigast, at PCB-innihaldið er ov høgt.

Steinar Bastesen sigur, at Noreg nú eigur at finna sær onnur lond, sum vilja keypa tvøst og spik. Her hevur hann fyrst og fremst Ísland í huganum, men eisini Føroyar og Grønlandi vilja hava áhuga.

Steinar Bastesen vitjar í Føroyum seinast i september í samband við at heimsins hvalaveiðutjóðir hittast.



# Ólag á flogferðsluni

*Nógvi mjørkin í Vágum tarnaði flogferðsluni almikið í gjár. Tað sást eisini aftur á parkeringini, sum var so sum so uttan fyri terminalin*
*Mynd: Edvard Joensen*



**Tveir mjørkadagar gera, at rættiligur sperðil kemur í flogferðluna um flogvøllin í Vágum. Eini 400 fólk bíðaðu á middegi í gjár**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

**Flogvøllurin:** Mjørki hevur verið í Vágum í tveir dagar, og tí hava eini 400 ferðafólk verið ávirkað av. Hóast Atlantsflog avgreiddi allar sínar ferðir mánadagin, lendu flogførini hjá Maersk Air ikki.

Heldur ikki týsdagin komu flogførini til tíðina, men eitt flogfar hjá Atlantsflogi, sum stóð á flogvøllinum, slapp avstað fyrrapartin.

–Tað krevst ikki sama sýni til at lætta sum at lenda, verður upplýst frá Statens Luftfartsvæsen á flogvøllinum í Vágum.

Flogfarið hjá Atlantsflog úr Danmark, sum skuldi koma fyrrapartin, var ikki lent á middegi, og flogfarið hjá Maersk Air var farið aftur til Bergen.

Av flogvøllinum varð upplýst, at umleið 330 fólk, sum skuldu við Maersk flogførunum, bíðaðu, meðan Atlantsflog hevði upp í eitt flogfar av ferðafólki gangandi. So alt í alt mundu eini 400 ferðafólk liggja veðurføst, varð mett á flogvøllinum á middegi í gjár.

Eisini uttan fyri terminalin sást, at ólag var á. Óvanliga nógvir bilar vóru at síggja, og skilliga sást, at parkeringsviðurskiftini ikki eru nøktandi. Fram við vegjaðaranum stóðu bilar allastaðni. Eisini har, sum skeltini søgdu, at als ikki var loyvt at steðga tíansheldur parkera. Og úti í grasinum stóðu teir eisini.



*Inni í terminalinum var hvør stólur upptikin og væl tað*
*Mynd: Edvard Joensen*

LISTASTEVNA FØROYA
2002 ARTS FESTIVAL
3. - 18. august 2002
Gismonti hin besti úr Brasil



Egberto Gismonti, Flemming Agerskov, Anders Banke, Jacob Holm, Jonas Johansen, Marie Louise Schmidt og føroyingurin Edvard Nyholm Debess.

Leygardagin 10. august
Høllin í Norðurlandahúsinum
kl 19:30 Kostnaður 225 kr

Atgongumerkjasøla
Norðurlandahúsið tlf +298 317900
Kunningarstovurnar
Tórshavn tlf. +298 315788
Klaksvík tlf. +298 456939
Fuglafjørður tlf. +298 444860
Saltangará tlf. +298 449449
Vágoy tlf. +298 333455
Sandur tlf. +298 361836
Tvøroyri tlf. +298 372481

www.listastevnan.com